# Sandoyartunnilin útsetir aðrar íløgur

**At Sandoyartunnilin kemur á fíggjarlógina fer at ganga út yvir aðrar íløgur, tí samlaði útløgukarmurin má ikki vaksa, um ferðin skal takast av búskapinum, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum mælir til. Hetta fer eisini at síggjast aftur á tí fíggjarlógaruppskoti, sum Magni Laksáfoss er í ferð við at gera**



*Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Magni Laksáfoss, undrar seg framvegis yvir, hví tað er so umráðandi at fara í gongd við Sandoyartunnilin nú og niðurraðfesta aðrar týdningarmiklar íløgur í skúlaverk, sjúkrahúsverk og almannaverk- og heilsuverkið*

*Savnsmynd*

FÍGGJARLÓG

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Magni Laksáfoss er væl nøgdur við, at Bjarni Djurholm hevur gjørt av at seta Sandoyartunnilin beinleiðis á fíggjarlógina, og ikki leggja tunnilin inn í eitt alment partafelag, sum ikki hevði verið ein beinleiðis partur av fíggjarlógini. Ikki tí landsstýrismaðurin í fíggjarmálum er samdur í, at íløgan skal í gongd nú, men tí tunnilin so gerst ein partur av samlaðu íløgukabalini.

Landsstýrismaðurin dylir tó ikki fyri, at verður Sandoyartunnilin raðfestur frammalaga, vil hetta sjálvandi merkja, at aðrar íløgur mugu bíða. Magni Laksáfoss vil tó ikki seta tal á nakað, tí enn standa nógvar samráðingar fyri framman, áðrenn fíggjarlógaruppskotið er klárt at leggja fyri tingið í september.

Ynskini til íløgur hava seinnu árini ligið millum 700 og 900 mió. krónur, meðan játtanin á fíggjarlógini í ár er undir 300 mió. kr. Við yvirhitingini av búskapinum í huga kundi Magni Laksáfoss hugsað sær, at íløgukarmurin fyri 2008 verður skerdur í mun til 2007.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil ikki fara inn og seta tøl á, hvat ein Sandoyartunnil fer at merkja fyri aðrar íløgur. Sosialurin hevur tí gjørt eitt roknistykki, hvat íløgan í Sandoyartunnilin fer at merkja fyri íløgur á øðrum økjum.

Roknað verður við, at tá arbeiðið við Sandoyartunlinum, sum verður mettur at kosta millum 700 og 800 mió. krónur, er farið í gongd, og tunnilin skal byggjast yvir fýra ár, so kostar tunnilin runt roknað 200 mió. krónur um árið.

Um landskassin skal halda fast við árliga íløgukarmin, ið sum áðurnevnt, væntandi fer at liggja millum 250 og 300 mió. krónur komandi árini (hendan játtan kann tó koma at sveiggja frá ár til ár, um búskapurin loyvir tí) merkir hetta, at Sandoyartunnilin fer avstað við minst tveimum triðingum av hesi upphæddini á fíggjarlógini.

Spurdur um tað ikki er ein ómøgulig uppgáva fyri hann sum fíggjarmálaráðharra at fáa fíggjarlógina at ganga upp við eini so stórari einstakari íløgu, og hvat hetta fer at ganga útyvir, svarar Magni Laksáfoss:

– Mín uppgáva er at gera eitt fíggjarlógaruppskot, sum hongur saman og ikki avgera, hvat skal útsetast. Eg má bara enn einaferð staðfesta, at tað undrar meg stórliga, hví Sandoyartunnilin er so týdningarmikil at gera nú, tá vit hugsa um, hvussu stórur tørvurin er á íløgum í skúlaverk; sæð í ljósinum á vánaliga pisaúrslitinum hjá okkum, umframt sjúkrahúsverk og almanna- og heilsuverkið. Hvat er tað, sum er so týdningarmikið við at byggja Sandoyartunnilin?, spyr Magni Laksáfoss, men leggur tó afturat.

– Sum so havi eg ongan trupulleika við, at Sandoyartunnilin nú er komin á fíggjarlógina, tí so verður hann ein partur av samlaða íløgukarminum, og hetta er tað mest týdningarmikla fyri meg sum landsstýrismann í fíggjarmálum, sigur Magni Laksáfoss.

## Spara í almenna rakstrinum

*Væntar tú ikki, at tað fer at ljóða eitt ramaskríggj, tá tað fer at ganga upp fyri øllum teimum, sum skulu spara?*

– Ramaskríggj er títt orð, og nei, tað veit eg ikki, sigur Magni Laksáfoss.

*Løgmaður boðaði í Sosialinum gjár frá, at skattalættin ikki má nertast, og landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum boðaði í blaðnum fyrradagin frá, at hansara øki verður dýrari. Hvussu ætlar tú at fáa kabalina til at ganga upp?*

– Eg haldi, tað er sera óheppið, at man fer út og avmarkar møguleikarar at gera inntriv, so langt áðrenn vit eru komin á mál við fíggjarlógaruppskotinum, sigur Magni Laksfoss.

*Tú hevur fingið til uppgávu at tálma ígjøgnum fíggjarlógina. Í hesum liggur væl eisini, at tú skalt finna sparingar í rakstrinum hjá tí almenna. Hvussu fert tú at gera tað, tá til dømis eini 80 prosent av almennu rakstrarúrtreiðslunum eru lønir til starvsfólk?*

– Tað, sum man ger, tá man tálmar, er at man útsetir nakað av tí menning, sum er stungin út í kortið innan fyri tað almenna, sigur Magni Laksáfoss.

Aftan á tingfundin í dag verður fundur í tingbólkinum hjá Sambandsflokkinum, har millum annað komandi fíggjarlóg er skránni, og hvørji onnur stig, Sambandsflokkurin meinar skulu takast fyri at náa málinum um at tálma yvirupphitingini í búskapinum.